


*Soleiðis sá Óli Petersen oljuleitingina á Atlantsmótinum fyri skjótt 15 árum síðani, tá hann í 91 hevði hesa stuttligu og sigandi tekningina frá leitingini hinumegin markið. Í dag er so støðan tann, at oljufund nettupp hinumegin markið hevur skapt stóran áhuga fyri leiting her og er møguleiki fyri, at ein oljukelda í bretskum øki heldur fram inn á føroyskt øki*




*Mynd Jens K Vang*

- Fyri Føroyaøkið er tað sera gott, at nýggj feløg koma við. At eitt stórt felag sum ChevronTexaco er komið inn á landgrunnin er sera positivt, tí tað hevur nógva vitan um alt Atlantsmótið.

Í dag telist Statoil millum fremstu loyvishavararnar á øllum Atlantsmótinum. Felagið hevur flestu loyvini á landgrunninum, íalt seks. Av teimum er felagið fyristøðufelag í fimm loyvum. Á bretskum øki er Statoil við í fýra loyvum, teirra millum stóra framleiðandi Schiehallionfeltinum.

Hví er Statoil so fokuserað uppá Føroyaøkið?

- Vit hava lagt eitt stórt arbeiði í Føroyaøkið heilt frá byrjan. Tað vóru onkur vónbrot í byrjanini, tá vit boraðu ein turran brunn. Kortini hava vit gjørt eitt stórt tekniskt arbeiði og hava skotið nógvan seismikk síðani vit boraðu. Vit síggja, at váðin er stórur á, og her eru nógvar teknologiskar avbjóðingar fyri framman, serliga tá hugsað verður um basaltið. Men vit halda framvegis, at hetta er vert at fara eftir. Við tí vitan vit hava á Føroyaøkinum og økinum kring okkum og við tí virkni , sum Statoil leggur fyri dagin, so halda vit, at her er nakað at fara eftir. Økið er enn ov gott at fara frá.

Loyvini í 2. rundu eru frá 3 til 5 ár. Í byrjanini verður farið at skjóta seismikk. Síðani er eitt skotbrá frá 3 til 5 ár, har man ger av, um man skal átaka sær eitt boriforpliktilsi. Ætlanin er at fara at skjóta seismikk í summar og tey fyrstu árini verða nýtt til at kanna, um tað er vert at taka eitt boriforpliktilsi á okkum ella ikki sigur Statoilstjórin.

*Longu í 1991 var eitt seismikkskip á Havnini, helst tað fyrsta nakrantíð. Tað var Patric Haggarty. Umborð vórðu eisini jarðalifrøðingar, sum hava kannað landgrunnin. Her er ein teirra, sum Sosialurin bað peika út tað mest áhugaverda økið á landgrunninum. Tað vísir seg, at júst hetta er eitt av økjunum, har Statoil einsamalt hevur fingið leitiloyvi í 2. útbjóðing*
*Mynd Jan Müller*



Statoil fer saman við ChevronTexaco, Dong og OMV at bora avmarkingarbrunn hinumegin markið í summar. Hann útilokar ikki, at verður hetta væleydnað, kann tað fáa positiva ávirkan fyri arbeiðið á Føroyaøkinum. Statoil skal bora enn ein brunn í 1. útbjóðing. Tað hevur verið frammi fyrr, at prospektiviteturin í tí verandi økinum er ikki so góður, og tað er tí avgjørt ein møguleiki at flyta henda brunnin inn á 9 ára loyvi.

Rúni Hansen sigur, at tað nú umrædur at halda fram við kanningunum á landgrunninum. Tað týdningarmesta er kontinuiteturin – at arbeiði er í gongd, samtíðis sum nakað er í gongd í bretska økinum eisini. Í næstum fer Statoil at flyta skrivstovuna oman á Bryggjubakka.